# Blíðkar hann veðrið í nátt, so fari eg avstað

**- Hvat vit fáa uppá ein stamp í dag? Tú, tað er øgiliga misjavnt. Tað er einki at reypa av - eini 60 pund, kanska. Er tað onkur, sum kemur á eitt gott stað, so kann hann fáa eini 200 pund. Men í miðal - tja, tað liggur langt undir 100 pund uppá stampin, sigur útróðrarmaðurin, Hans Odmar Højgaard**

ÚTRÓÐUR
*Snorri Brend*

– Áh, nei og nei. Í dag gongur ikki alt for væl. Hygg, sært tú ikki?! Agnið á húkunum er so øgiliga fryst!

Tað er seinnapartur. Arbeiðsdagurin er skjótt liðugur hjá teimum flestu, og nú stendur vikuskifti fyri framman.

Hesin kaldi, glerstoytti og lítið áhugaverdi fríggjadagurin er um 16 tímar gamal, tá eg koyri ein túr oman á Vestaru bryggju í Havn. Ørindini eru at fáa eitt lítið prát við onkran egnara.

Eg kann skjótt staðfesta, at kavin hevur lagt sína "køldu" hond oman á egningarvinnuna henda dagin. Ikki ein einasti bilur er at síggja frammanvert egningarskúrarnar, og heldur ikki hómast nakað fólk, sum henda dagin fæst við egning. Ikki eitt.

Sum eg koyri út eftir molanum síggi eg at ljós er í einum av skúrunum. Í roynd og veru einasta ljósið henda dagin. Einasta ljósið, sum ein boðberi um at her verður í øllum førum ikki hugsað um kava og kulda. Ikki tikið fyrilit fyri fyribrygdum av slíkum slagi. Í


*- Tað er ongastaðni nakað at fáa, sigur útróðrarmaðurin, Hans Odmar Højgaard. Í dag má ein vera nøgdur við 60 pundum uppá stampin*

huganum er bert hetta eina: At fáa egnt stamparnar, so farast kann til útróðrar, so skjótt sum líkindini verða til tess.

Tað er bítandi kalt, og hann sjálvur, altso veðurmaðurin hevur boðað frá kulda niður í 8 stig í nátt. Men her inni í kalda skúrinum stendur ein maður og fæst við tað, honum líkar best og sum hann sær fram til: Hans Odmar egnir ein stamp, samstundis sum hann sær fram til løtuna, tá hann enn einaferð kann leggja frá landi við báti sínum "Pandy".

Samstundis sum boðað er frá hesum øgiliga kuldanum, so er líkt til at tað verða líkindi at leggja frá landi í nátt einaferð. Hann fer at tjekka tey seinastu veðurtíðindini av seinni í kvøld.

– Blíðkar hann veðrið, so fari eg avstað!

### Eingin fiskur

Hans Odmar Højgaard er útróðrarmaður, og rør í dag út einsamallur við "Pandy".

Henda fríggjadagin í farnu viku, vit stukku framvið egningarskúri hansara, var hann júst í ferð við at egna sær eina línu. Hann er einsamallur í skúrinum. Har stendur eitt útvarp, men tað er ikki tendrað. Ljóðið frá frystigoymsluni er hansara einasti fylgisveinur í dag.

Hans Odmar egnir so hugagóður. Hetta við útróðrinum er hansara lívsstarv, men samstundis veit hann alt um tey korini, sum hann og starvsfelagar hansara liva undir: Tann skiftandi fiskiskapurin.

Teir kunnu minnast aftur á tíðir, tá teir kundu fáa fleiri hundrað pund av fiski uppá stampin, men í dag er øðrvísi. Nú er ein noyddur at vera nøgdur við munandi minni nøgdir, samstundis sum alt annað hækkar.

Teir royna at finna fram til tey støðini, har fiskurin er, men fiskieydnan er ikki altíð við teimum. Hjá teimum er tí neyðugt at fiska á mongum ymiskum støðum, hóast tað ikki allastaðir er eins nógv at fáa.

Tá eg so spyrji Hans Odmar, hvar ið mest er at fáa í løtuni, kemur svarið beinanvegin: "Tað er ongastaðni nakað at fáa!"

### 60 punf uppá stampin

Hans Odmar hevur egnt alla tíðina undir práti okkara, og nú talan kemur inn á nøgdirnar, steðgar hann eitt sindur á. Hetta er nakað sum harmar bæði hann og hinar útróðrarmenninar.

– Hvat vit fáa uppá ein stamp í dag? Tú, tað er øgiliga misjavnt. Tað er einki at reypa av - eini 60 pund, kanska. Er tað onkur, sum kemur á eitt gott stað, so kann hann fáa eini 200 pund. Men í miðal - tja, tað liggur langt undir 100 pund uppá stampin.

Hann hevur roynt ymsastaðni við línuni. Fyrr var hann ofta á Føroyabanka, men har er ikki loyvi at royna. Tað longsta, hann nú kann fara, er út á Skeivabanka. Um summarið hevur hann onkutíð verið vestan fyri Mykines við snellu.

– Sum er liggur man bara 5 til 10 fjórðingar úr landi. Eg brúki mest gággu til agn, fyri at fáa tann góða fiskin - serliga tann gráa fiskin. Tað er øgiliga góður prísur á honum, men tað er tíverri bara so lítið til av honum!

Hans Odmar er nú næstan liðugur við henda stampin. Eg takki fyri stutta prátið, og fari útum aftur. Kuldin er øgiligur, og merkist beinanvegin. Innan fyri í skúrinum er eisini kalt, men her heldur arbeiðið fram uttan steðg. Stampurin skal í frystirúmið, og so verður farið undir tann næsta.

Her er eingin steðgur. Arbeiðið skal halda fram, hóast nøgdirnar eru minkandi. Hetta tekur tó ikki mótið frá Hans Odmari og hinum føroysku útróðrarmonnunum. Hóast baksið halda teir á. Á snjóhvítum vetri og á hásumri. Ár eftir ár eftir ár. Uttan teir vóru vit fátækari.

## – Hopi ikki at olja kemur uppá land her

**Hans Odmar Højgaard heldur, at føroyska samfelagið er ov følsomt til ta stóru fremmandu arbeiðsmegina**

OLJA OG ÚTRÓÐUR
*Snorri Brend*

Í hesum døgum eru menn farnir undir at gera klárt til annað umfar av royndarboringum eftir olju á føroyskum øki.

Hetta hevur áhugan hjá mongum føroyingi, og Hans Odmar Højgaard hevur eisini fylgt við í hesum orðaskiftinum.

Og hann hevur eisini gjørt sær sínar hugsanir um Føroyar, skuldi borið so á, at vit gerast eitt oljuland einaferð í framtíðini.

– Tað er í fínasta slag við tí. Men tað er bara tað, at man má gera sær púra, púra klárt, at okkara samfelag er so følsomt. Tað tolir ikki, at man fær fleiri hundrað fremmandar arbeiðarar til landið. Tað tolir landið simpelthen ikki.

– Alt hetta fær so nógvar fylgjur fyri okkara lítla land, m.a. tey nógvu stoffini og øll misnýtslan av tablettum, og alt tað, sum fylgir við tí. Tí hopi eg ikki, at oljan fer at koma uppá land í Føroyum, men fer uppá land onkra aðrastaðni - t.d. í Hetlandi, sigur hann, og endurtekur tað, hann segði í áðni:

– Hetta samfelagið er so følsomt. Tað tolir ikki alt hetta!

Hóast oljan kanska ikki kemur uppá land í Føroyum, so væntar Hans Odmar kortini at føroyingar fara at fáa nógv burtur úr henni:

– Eg meini, – vit eiga jú ráevnini, ikki sannheit. Og so mugu hinir betala fyri at fáa tey! Um tú so ikki fært alt beløbið, so uppvigar tað kortini tað, sum tú missir, við at tú beheldir nasjónina inntakta, ístaðin fyri at alt fer í fillir. Fært tú ikki alt, hvat ger so tað, um tú bara kanst redda samfelagið?!





